TILTØK

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 28. apríl
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Veving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, telving, dart og onnur spøl
Túrurin mikudagin til Váganar, skal gjaldast áðrenn, 200 kr.
Týsdagin 29. apríl:
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Jóhann R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Hugleiðingar um at verða gamal. Jógvan Fríðriksson
Mikudagin 30. apríl:
Tilhaldið stongt í dag. **Túrur til Váganar. Úr Steintúni kl. 10. Vitja verður í Sandavágs kirkju, bygdasavnið í Miðvági, Kálvalíð, døgurði á Hotel Vágum kl. 12. Síðan verður vitja í Bø. Aftur í Havnini kl. 16. Kostnaður 200 kr. gjaldast áðrenn. Ferðaleiðari verður við á túrinum.**
Hósdagin 1. mai
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát – Brandur Petersen
Fríggjadagin 2. mai:
kl. 10-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

NA (Anomymir narkomanar)
Reinsarið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvønn hósdag kl. 17.30 til 18.30 og sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

AA-fundir í Havn
Reinsarið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21 og 22.30-23.30.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsariinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Hugnalota verður í Kapprórarneystinum á Glyvrum fríggjakvøldið 2. mai kl. 21.00. Á skránni. »Lívsvanar og ítróttur« v/ Sólvu R. Hansen ÍSF-ungdómsráðgeva. »Lívsvanar millum ung« v/ Tórhild Bjarkhamar, Blákross verkætlanarleiðari. Sangbólkurin VOF syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Vika 18 – 30. apríl
Vinnaratøl: **09 - 21 - 27 - 34 - 43 - 47**
Eykatøl: **08 - 40**

6 vinnaratøl:	**2.475.521,- kr.**
5 vinnarat.+ eykatal	**76.595,- kr.**
5 vinnaratøl:	**4.682,- kr.**
4 vinnaratøl:	**116,- kr.**
3 vinnaratøl:	**38,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

GJALDOYRAKURSIR

Gjaldoyrakursir ásettir av danska Tjóðbankanum		30.04.03	Ultimo mars
USA	**Dollarar**	666,9900	681,6300
Bretland	**Pund**	1065,1800	1076,9100
Svøríki	**Króna**	81,4300	80,1900
Noreg	**Króna**	94,7200	94,0100
Sveits	**Frankur**	490,6700	503,0100
Ísland	**Króna**	8,8800	8,8900
Kanada	**Dollari**	462,9200	463,0800
Japan	**Yen**	5,5830	5,7489
	Evra	742,4300	742,6400

FØROYA SPARIKASSI

KROSSORÐ

339	NAGLAR	ØRRU-VÍSI	EINS	KILO-VOLT	TÝSK Á	SKIPAN	TRÆ	NITRO-GEN	MAY-DAY	KONA	BUNDIN	LADA	TIATIV	EINS		SEGL-SKIP
INN-TØKAN	L														BETA	
															TRØYST	
ÁRUNI							2	MAÐUR								
								ENDI								
KELI-NAVN				FRØÐERIK					3							
				JÁSSUR												
KYN			STYTTING	4			NORGE		GRAMM	VOKALAR			VÆTA	GØTE-BORG		
			KÓSIR				HITA			KONU				FÍNA		
NÆGD											LADY	LORABI				
												AKA				
SPRINGA					BENSÁRI			5	MAÐUR						ITALIA	
					OXY-GEN				BYRGI						ÁRAN	
HETUR		BÍBIL-FJÁL	SAMAN-HALD	6												
			MERKI													
MAÐUR						MORÐ	JØGI				KONA				SPANIA	RE-GRESS
											OBS!					
SKIKKI					SILI-CIUM		GUÐUR					FARV-AN	DRÍV			7
							TVÍLJÓÐ						ONGGÁ			
KRYDD-URT				LEIÐI					8	EDIST-LAR					REX	
				KALIUM											VOLT	
MAÐUR					LITUR		"MÓTI"			ØLLUM	KONA					
					ERTI		DÝR				RØNE					
OKSI				KOM-FØRUR				BÚNDA HÚS							KÓS	
				VALS											VATN	
TROLARI			SKJÓT				9	TIL			FÓLKA-SLAG	10				
											SKRIVAÍ					
ÁRAN		RAV-MAGN	SPANSKÁ					KANN-INGAR								NEON
			SKJÓTT					BJÓR								
LOYPIÐ				11			GJØGV					NULL	GUÐUR			
							SVÁVUL						REX			
	DÝR				UM-STØÐUR				12					LYME		

Vinnari:

Súsanna Nielsen
Mýrisnipuvegur 44
100 Tórshavn

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: LIKKUDALUR

L	E	Y	G	A	R	Ð	A	G	U	R	R	E	Y	Ð	Í	
A	K	R	Y	L		Í	G	U	L	K	E	R		Ð	Ð	
N		K			K		A	L	T		D	M	I		R	
G		Í	M	P	O	R	T		R			A	L	T	A	
A	N	N	A	R-	P	Á	S	K	A	Ð	A	G	U	R		
F	A	G	R	A	R			M	V		B	A	S	A	R	
R	N		Í	N	A	R	Í		Í		B	T	H		Í	
Í	N		U	G		Í	Ð		O	P	A		Í	N	N	
G	A	M	M	A	S	T	R	Á	L	U	R		N	Ó	G	
G		E	E		R	A	A	S	E	Y		C		A	Í	
J	E	N	S	E	N		N	E	T	D	A	M	L		K	
A		N-	S		S	S		Y	T	E	R		T	Ø	L	
D	M		A	S		E	Í	Ð		D	A	Y		L	O	
A	A	A		T	A	R	V	Í		O	E	T	A		K	
G	Í	G	G	A		Í	A	R	O	M	A	R		D	K	
N		Y	Ð	U	R			B	E	T	A	N	Í	A		

338

Hvønn fríggjadag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).
Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.
Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. ...« á bjálvan.

339

Loysunarorðið: .....
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: .....

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***
- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** *- Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***
- ❑ **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ❑ **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- ❑ **Havið** - *Bogi Hansen*
- ❑ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ❑ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt

ítróttur
Nr. 83 • fríggjadagur • 2. mai 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Enn større fokus

Vitjanin hjá FIFA-forsetanum kann bara vera við til at økja um fokus á Føroyar, heldur FSF-forsetin, Dánjal Andreasen

VITJAN
Jákup Mørk

Við at sýna fram land okkara fyri Blatter og annars við at sýna vanligt føroyskt gestablidni eri eg ikki í iva um, at fótbólturin soleiðis í enn større mun kann vera við til at seta Føroyar á heimskortið, sigur FSF-foramðurin, Dánjal Andreasen

- Hetta er kanska ikki nakað, sum vit beinleiðis koma at merkja ávirkanina av alt fyri eitt.

Hetta eru fyrstu orðini, sum FSF-formaðurin, Dánjal Andreasen, hevur at siga, tá vit spyrja hann, hvat FSF itøkiliga kann fáa burturúr tínu vitjanunum, sum Fótbóltssambandið fær í ár.

Men hann leggur tó afturat, at hann als ikki er í iva um, at upp á longri sikt, kann hetta bara vera til fyrimuns fyri Føroyar og føroyskan fótbolt.

- Hetta eru jú teir báðir mætastu menninir innan heimsfótbóltin, og bara tað, at teir koma her, skapar eina rúgvu av umrøðu. Lennart Johansson hevur jú verið her áður, sum formaður fyri svenska fótbóltssambandið, men sum UEFA-forseti er munandi størri áhugi fyri, hvørjum hann tekst við.

- Og so er tað Blatter. Tað eru at kalla altíð fjølmiðlafólk við, har hann ferðast, og tí eri eg næstan vísur í, at útlendski áhugin fyri hesi vitjanini verður stórur. Ikki minst tá tað samstundis verður lagt saman við einum landsdyst, soleiðis at miðlarnir tá kunnu fáa tvey fyri eitt á eini føroyavitjan. Við at sýna fram land okkara fyri honum og annars við at sýna vanligt føroyskt gestablidni eri eg ikki í iva um, at fótbólturin soleiðis í enn større mun kann vera við til at seta Føroyar á heimskortið.

Kann ikki skaða

Eitt er, at hetta á hendan hátt kann verða enn eitt skump til føroysku ferðavinnuna sum heild, men hartil metir Dánjal eisini, at vitjanin kann gagna FSF.

- Sum sagt, so er ikki akkurát nakað ítøkiligt, sum vit kunnu fáa her og nú. Men júst Blatter hevur á nógvum økjum verði sera aktivur við at stuðla minni londunum í FIFA. Eitt nú var hann sera aktivur, tá sonevndi GOAL-grunnurin varð stovnsettur. Uttan hendan grunnin – og stuðlin frá landsstýri og býráðnum – hevði so als ikki verið gjørligt hjá okkum at bara hgusa um nýggja bygningin við Tórsvøll.

- Tað er so í øllum førum nakað, sum vit kunnu vísa honum, nú hann kemur á vitjan, og í aðrar mátar kunnu vit so eisini kunna hann um, hvørjum ætlanum vit arbeiða við. Bæði innan sjálvan fótbóltin og so eisini umstøðurnar hjá fótbóltinum.

- Eitt er so heilt víst. Tað kann undir ongum umstøðum skaða okkum, at vit á hendan hátt kunna bæði Johansson og Blatter um okkara fatanir og ætlanir, og so má tíðin vísa, um tað enntá kann vera beinleiðis at gagni, sigur Dánjal Andreasen at enda.

Sterku menninir koma til Føroya

Bæði UEFA- og FIFA-forsetin koma hetta árið á Føroya vitjan

VITJAN
Jákup Mørk

Tað skuldi bert ein leysur fyrispurningur til, áðrenn sterki maðurin í altjóða fótbólti, Sepp Blatter, mest sum hevði játtað at koma á føroyavitjan

Mynd: Reuters

Tað er ikki hissini vitjan, sum Fótbóltssamband Føroya fær hetta árið. Bæði UEFA-forsetin, Lennart Johansson, og FIFA-forsetin, Jospeh Blatter, eru bodnir hendavegin, og teir hava báðir tikið av innbjóðingini.

Við hesum koma teir báðir mætastu persónarnir innan fótbóltsheimin til lítla land okkara, og hóast tað í fyrstu syftu ikki nýtist at merkja nakrar ítøkiligar betranir fyri føroyskan fótbólt, so er hetta tó við til í enn størri mun at seta Føroyar á altjóða fótbóltskortið.

Gjørdu skjótt av

Fyri mong kann tað tykjast eitt sindur løgið, at tveir so mætir menn hava hug at koma hendavegin, men tað tykist als ikki hava verið nakar trupulleiki í hesum førinum.

Lennart Johansson er vanliga við, tá Norðurlandafundir verða hildnir, og tá hesin verður hildin í Føroyum í ár, hevur hann gjørt av at koma hendavegin. Fundurin hevur eisini áður verið hildin í Føroyum, men ta ferðina barst undan hjá Lennart Johansson.

Við Joseph Blatter er søgan eitt sindur øðrvísi. Hetta er ein vitjan, sum kom í lag heldur óformliga, tá føroysk umboð fyri stuttum vóru á UEFA fundi.

Formaðurin í FSF, Dánjal Andreasen og aðalskrivarin, Ísak Mikladal, vóru í mars mánaði í Rom á UEFA kongress. Á hesi kongressini var eisini Blatter, og tað fall soleiðis, at føroysku umboðini komu í prát við mannin.

Føroysku umboðini gjørdu ikki mætari, enn at spyrja, um hann ongan tíð hevði hugsað um at vitjað í Føroyum, og tað hevði maðurin.

- Hann segði, at hetta var nakað, sum hann fleiri ferðir hevði ætlað, men at tað enn ikki var blivið til nakað. Hann helt sjálvur, at hetta helst mátti vera í samband við ein landsdyst, og so var bara at gera skjótt av, sigur Ísak Mikladal.

Heimafturkomnir settu so teir báðir FSF menninir seg niður at skriva eina innbjóðing, har teir spurdu FIFA-forsetan, um hann vildi koma á vitjan, tá Føroyar tann 20. august spæla landsdyst móti Íslandi.

Vitjanin hjá Lennart Johanssson er annars í døgunum 1. til 3. august.